


# Konsert í Bátasavninum í Leirvík sunnudagin 22. sept

**Frits Johannesen**



Millum gamlar fjalar, línutrog og kýkar var ljómur frá Bach til Mozart. Kingosálmurin sat í borðum, stokkum og árum á hesum bátum, sum Osmund Justinussen, skyldmaðurin, hevur reist í heimbygdini, sum minni um teir, sum slitu stórsta partin av ævi síni í Djúpinum og á Norðhavinum. Toganin móti vindi, streymi og aldudragi myndaðu teir, ið sótu á hesum bekkum, so løtan hetta kvøldið kveikti so mangt í huga tínum. Monika Staus Joensen og vinkonan, Helene Ringgenberg, róðu upp undir løtuna í yndisligum spæli. Hetta var ein annar róður og aðrir tónar enn gomul sálmaløg, sum stumm sótu á bekki og lýddu á.

Lítið vistu útróðrarmenninir, ið mangan móðir og troyttir slitu upp land og settu bátin á lunn ella í lunnbót, at Bach og Mozart fóru at kína hesi gomlu bátaborð.

Løtan var góð. Tann løtan, ið er góð, er ikki ring. Her var kórlistamaðurin, Willi Gohl, komin at vitja og Ólavur Hátún, so spelkin sum ein lomvigi, var eisini við á hesi fagnaðarstund. Teir hava í fýrati ár kent hvønn annan, og er mong kyldin farin um tónlistastráini hesi ár, so vit kunnu eisini siga, at stundin var ein skygging av farnum døgum í tónlist og sigsøguligum anda. Willi Gohl greiddi frá Moniku, tá ið hon í sínum ungu árum lærdi violinspæl á tónlistaskúlanum í Winthertur, ið liggur einar 20 minnutir frá Zürich, sum er heimstaðurin hjá Moniku. Á hesum skúla var Willy Gohl rektari. Hann helt hetta vera sera hugvekjandi, at hon skuldi búseta seg so fjart frá heimlandi sínum, men hugflogið um list - um tónlist og myndlist, eigur eisini at røkka útjaðarin, og tí var tað rætt gjørt, at Monika setti seg niður í Leirvík.

Ólavur nart við tað samarbeiðið, sum hevði verið millum Willi Gohl og hann tey seinastu fýrati árini. Ja, eg má siga.. tey byggja land, ið liva… og hava nógvar mennandi løtur verið á hesum klettum saman við Willy Gohl, sum Ólavur hevur tikið stig til, og vit onnur hava notið gott av. Hugsið tykkum til! Í øðrum samfeløgum á stødd við okkara, er kanska bert ein pylsuvognur at finna, tá ið komið verður at tí samfelagsligu- mentanar - tinnuni, men her á landi, hava vit eina livandi mentan, sum øllum stendur í boði at vera við í. Vit kundu tikið fullveldið í morgin, um so var! Eingin ivi um tað! Her er eingin bági!!!

Sigast kann, at vit hava loyst úr lagdi og gjørt okkum vís um okkara mentan. Soleiðis eigur tað at vera. Tað eigur at gera okkum eymmjúk, tí einki kemur av sær sjálvum. Tað skal vilji og vælvild til frá øllum pørtum til at fremja verkið, og tað má gerast í tign og anda, sum Willi Gohl og Ólavur hava sýnt. Kórlistamaðurin Willy Gohl átti at fingið ein ella aðra heiðursgávu frá landi og fólki. Hann er eingin ársungi longur, og speglið lýgur ikki. Hetta hevur hann sanniliga uppiborið.

Hugsi, at Willy Gohl er sjeyti sjey ára gamal, og kann hann líta aftur um bak á ríkt tónleikalív. Hann hevur eina inniliga, menniskjansliga, litfagra hugsan og uppfatan av kórsangi. Hann nam júst við hetta, at eftir 2. veraldar bardaga lá Evropa í knúsi, og tí skuldi kórsangurin vera við til at sjóða fólk saman aftur. Hesum hevur hann sanniliga verið við til at menna t. d. í Europa Cantat, sum er kórstevna fyri amatør kór í Evropa. Hugvekjandi hevur verið at tosa við mannin, tí hann er vitandi. Hann hevur givið vanligum kórsangurum, kórleiðarum íblástur og lyft kórsangin á upp á eitt støði, har orð og andi í sangi setti halkoytur í óminnilgar dagar saman við hesum elskuliga menniskja Hesum taka nógvir føroyskir kórsangarar undir við og aðrir við víða um.

Yndisligu tónarnir úr spælinum hjá Moniku lótu sum føgur kvørkveggjuljóð úr strongi og úr violinbulinum. Monika er so blýðmælt og yndislig. Glómurnar glógvaðu, tá ið hon flytti bogan eftir violinstreingjunum, og cembalotónarnir frá Helene Ringgenberg flirraðu úr cembalokroppinum av tí garvaða J. S. Bach, sum tú ongantíð verður troyttur av. Hetta var í Leirvík í eini útróðrarbygd, sum sagt í fleiri hundrað ár hevur verið merkt av Brockmanslestrum, Kingoløgum og øðrum sálmasangi. Litfagri Bach, tann leikandi lætti Telemann og tann sálarkveikjandi Mozart var partur av hesi fagnaðarløtu. Ímillum bátar og myndir av Sámal Toftanes fór leikur fram. Her varð fongur drigin av skapandi grunni, sum er ogn okkara - tónlistin, málningalistin og sigsøgan. Hetta var bara soleiðis eitt sunnukvøld í Turkihúsinum í Leirvík sunnukvøldið 22. sept. 2002.



*Á bátasavninum í Leirvík*

Savnsmynd



**UTTAN ÚR HEIMI**

# USA kann ikki stýra heiminum

**Fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, hevur álit á, at ST kann loysa Irakkreppuna. Samstundis verður ávarað um, at islamsk lond kunnu fara at nýta oljuna sum vápn, verður Irak álopið**

IRAK-KREPPAN

*Árni Joensen*

Fyrrverandi amerikanski forsetin var gestarøðari á landsfundinum hjá bretska arbeiðaraflokkinum Labour, og sum væntað snúði ein partur av røðuni seg um Irak.kreppuna.

Bill Clinton tók undir við kravinum hjá amerikansku stjórnini um, at ST eigur at gera eina nýggja samtykt um Irak, og at vápnaeftirlitsmenninir skulu hava frítt at fara í Irak. Hann helt, at fæst semja um hetta, slepst undan einum amerikanskum álopi.

Í røðuni segði Bill Clinton, at vápnaeftirlitsmenninir hjá ST fingu góð úrslit, tá teir vóru í Irak í nítiárunum. Hann vísti á, at tá eftirlitsmenninir vórðu riknir úr Irak í 1998, høvdu teir oyðilagt fleiri kemisk og bioplogisk vápn, enn Flógvakríggið oyðilegði.

Clinton fanst ikki beinleiðis at ætlanini hjá George W. Bush, forseta at leypa á Irak og Saddam Hussein, men hann legði dent á, at altjóða stovnar sum ST hava stóran týdning fyri heimsins framtíð.

- USA kann leiða heimin ímóti einari betri samveru, men vit kunnu ikki noyða hann til tess ella stýra honum, segði Bill Clinton.



*Bill Clinton: -USA kann leiða heimin ímóti betri samveru, men vit kunnu ikki noyða hann til tess ella stýra honum*

*Mynd: Reuters*

## Oljan sum vápn

Í Malaysia ávarar landsins forsætisráðharri, Mahathir Mohamad, um, at tey islamsku londini kunnu fara at nýta oljuna sum vápn, verður Irak álopið.

- Oljan er tað einasta, sum tey islamsku londini hava, og sum umheiminum tørvar. Eru vit veik, verða vit misnýtt, og í dag síggja vit, at muslimar um allan heimin verða misnýttir. Skulu vit sleppa undan tí, noyðast vit at vera sterk. Vit eiga at loysa okkum frá øðrum og útvega okkum kunnleika, sigur malaysiski forsætisráðharrin við fronsku tíðindastovuna AFP.

Hann leggur afturat, at gera tey ialsmsku londini av at skerja oljuframleiðsluna, hækkar prísurinog tað kann nýtast sum vápn til tess at verja áhugamál muslimanna, heldur hann.

Mahathir Mohamad, sum hevur verið stjórnarleiðari í Malaysia í 21 ár, tekur næsta ár við sum formaður í islamska heimsráðnum. Síðani yvirgangsatsóknirnar at USA hevur hann verið talsmaður hjá teimum hóvligu muslimunum, og hann hevur fingið rós úr USA, tí hann hevur stuðlað bardagan ímóti altjóða yvirgangi.

# Aftur stríð um Barsebæck

**Danir eru í øðini, tí sviar ætla sær ikki at steingja kjarnorkuverkið við Oyrasund innan 2004 sum fyrr avtalað**

KJARNORKA

*Árni Joensen*

Tað var svenski forsætisráðharrin, Gøran Persson, sum fekk øði í danskar politikarar og aðrar danir, sum fegnir vilja hava kjarnorkuverkið hinumegin Oyrasund stongt sum skjótast.

Í einari samrøðu við danska sjónvarpið TV2 mikudagin segði Gøran Persson, sum býr í Malmø, at hann ætlar sær ikki at sita kaldur, bara tí Barsebæck verður stongt. Forsætisráðharrin legði afturat, at verkið verður ikki stongt, fyrr enn sviar hava fingið aðra orkukeldu ístaðin fyri kjarnorkuverkið.

Orðini hava fingið øði í danskar politikarar. Lars Løkke Rasmussen, innanríkisráðharri sigur seg vera skelkaðan av orðunum hjá Gøran Persson, og ráðharrin vissar danir um, at stjórnin fer framvegis at leggja trýst á svensku stjórnina í hesum málinum.

- Tað hevur størri týdning, at vit her á Keypmannahavnarleiðini kenna okkum trygg, enn at svenski forsætisráðharrin situr heitur á jólum, sigur Lars Løkke Rasmussen.

# 80 kvinnusmuglarar tiknir

**80 fólk eru tikin í einum felags evropeiskum løgregluátaki ímóti mannasmugling**

MANNASMUGLING

*Árni Joensen*

Átakið, sum evropeiska løgreglusamstarvið Europol og italska løgreglan skipaðu fyri, er tað størsta felags evropeiska átakið higartil ímóti mannasmugling.

Endamálið við átakinum var at gera enda á bólkum og felagsskapum, sum hava lagt seg eftir at smugla eysturevropeiskar kvinnur vesturum, har tær enda í skøkjuhúsum í ymsum londum.

Meiri enn túsund løgreglumenn vóru við í átakinum í Italia, Eysturríki, Spania, Portugal, Russlandi, Ukraina og í Hvítarusslandi.

Ein talsmaður hjá Europol sigur, at løgreglan legði seg eftir at fáa fatur á teimum, sum skipa fyri smuglingini, og sum vinna nógvan pening burtur úr at smugla kvinnur til tey vesturevropeisku skøkjuhúsini.

Í einum tilsvarandi átaki fyri fimm mánaðum síðani vórðu umleið hundrað fólk tikin. Fleiri teirra vóru limir í mafiuni í Italia og Albania.

## Havið er deytt

Fleiri túsund fiskar av ymsum slagi eru seinastu dagarnar riknir upp á land ymsastaðni í Danmark. Orsøkin er, at einki súrevni er í sjónum, og tí doyr fiskurin.

Donsku havfrøðingarnir, sum hava kannað viðurskiftini á botni, siga, at støðan hevur ongantíð verið so álvarssom sum nú. Tað er vanligt, at trot er á súrevni í summum donskum firðum um heystarnar, men í ár hava kanningar víst, at súrevnistrotið hevur rakt nógvar leiðir fram við jútsku eysturstrondini og millum oyggjarnar. Væl av vindi av landssynningi er tað einasta, sum kann hjálpa, tí so kemur røringur í sjógvin og harvið nýtt súrevni.

Samstundis eru danskir politikarar og umhvørvisfelagsskapir farnir at tosa um orsøkina til tað umfatandi súr-evnistrotið. Umhvørvisfelagsskapirnir hava hug at geva landbúnaðinum skyldina, og politikararnir tykjast vera samdir um, at øll londini við Eystrasalt mugu átaka sær sín part av skyldini.

## Vaksina ímóti malaria

Altjóða granskarar siga seg nú hava gjørt stór framstig í royndunum at finna eina vaksinu ímóti teirri herviligu malariasjúkuni.

Svenski granskarin Mats Wahlgren, sum er við í royndunum, sigur, at talan er um eitt veruligt frambrot, og hann sigur seg hava góðar vónir um, at tað fer at eydnast at finna eina vaksinu, sum kann fyribyrgja, at fólk verða smittað av malaria.

Millum 300 og 500 milliónir fólk verða smittað av malaria á hvørjum ári, og millum eina millión og 2,7 milliónir doyggja árliga av sjúkuni. Í teimum ringast raktu økjunum eru tað serliga smábørn, sum doyggja, og hagtøl vísa, at umleið 2.700 børn doyggja av malaria hvønn einasta dag.

## Hóttir við at fara frá

Norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, segði í gjár, at hann ætlar sær at leggja frá sær, um Stórtingið broytir fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 soleiðis, at trýstið á búskapin verður ov stórt. Fíggjarlógaruppskotið hjá stjórnini varð lagt fram í gjár.

Serliga Framburðsflokkurin hevur funnist at uppskotinum. Flokkurin vil m. a. hava lægri avgjøld á sigaettum og brennivíni fyri at steðga tí umfatandi handlinum um svenska markið. Flokkurin hevur eisini víst á, at fleiri fólk eru deyð í seinastuni, tí tey høvdu drukkið træspritt, og hetta heldur flokkurin vera eitt fullgott prógv fyri, at brennivínið er ov dýrt í Noregi.

Framburðsflokkurin hevur kravt, at stjórnin skal nýta meiri av landsins nógvu oljupengum til at fíggja lægri avgjøld, størri skattalætta og betri umstøður til tey eldru, men stjórnin hevur gjørt greitt, at hon fer ikki at taka meiri burtur av oljupengunum.

## Játtar seg sekan

Bretin Richard Reid, sum varð tikin í desember í fjør, tá hann ætlaði at spreingja eitt amerikanskt flogfar í luftina, er nú til reiðar at játta seg sekan.

Verjarnir hjá Richard Reid siga, at hann er sinnaður at játta seg sekan, um ákæruvaldið aftur fyri vil sleppa pástandinum um, at hann hevði samband við yvirgangsfelagsskapin al-Qaeda. Men tað ætlar amerikanska ákæruvaldið ikki. Tað heldur fast um, at tað var al-Qaeda, sum sendi hann at spreingja flogfarið. Tað hevur bretin avsannað.

Richard Reid varð tikin, tá ein av flogternunum legði til merkis, at hann var í ferð við at seta eld á skógvarnar. Tað vísti seg, at spreingievni var í skónum.